

# Línuskipari stýrir Eiðis kommunu

**EIÐI – Vit hava eitt gott havnalag. Rammurnar eru í lagi, og vit vóna, at tíðin fer at koma, tá meiri lív kemur í aftur. Hetta er einasta fiskivinnuhavn norðanfyri Streymin, sigur Rólant Poulsen, borgarstjóri í Eiðis kommunu**

Vilmund Jacobsen

Rólant Poulsen, sum í gjøgnum mong ár sigldi sum línuskipari, hevur sitið í Eiðis bygdaráð í tilsamans 10 ár og hevur verið borgarstjóri í kommununi síðan seinasta kommunuval fyri tveimum árum síðan.

Sjey bygdaráðslimir eru í Eiðis kommunu, sum umframt Eiði eisini fevnir um Ljósá og Svínáir.

– Tá eg gjørdist borgarstjóri, vóru vit 696 fólk í kommununi. Við árslok í fjør vóru vit 666, men nú eru vit aftur uppi á umleið 675.

Borgarstjórin sigur, at við Ljósá búgva eini 15-20 fólk, meðan nøkur fleiri búgva við Svínáir.

– Hini stívliga 600 búgva so her á Eiði, leggur hann aftrat.

## Gott grundarlag

Rólant Poulsen hevur áður sagt, at fyrr hevði Eiði nógv skip, men onga havn.

– Nú havn vit havn, men eingi skip, legði hann aftrat.

Borgarstjórin vísir á, at tað var tann tíð, tá nógv skip vóru heimahoyrandi á Eiði, men nú er bara Fugltúgvan eftir, sum er skrásett í bygdini.

– Vit hava eitt gott havnalag. Rammurnar eru í lagi, og vit vóna, at tíðin fer at koma, tá meiri lív kemur í aftur. Hetta er einasta fiskivinnuhavn norðan fyri Streymin.



*Rólant Poulsen hevur verið borgarstjóri í Eiðis kommunu seinastu tvey árini*

Rólant Poulsen sigur, at miðskeiðis í áttatiárunum vóru fleiri størri línuskip heimahoyrandi á Eiði, eitt nú Thomas Nygaard, Morgunstjørnan, Morgunroðin, Vaðhorn og Fugltúgvan.

– Størri útróðrarbátar vóru eitt nú Norðsøki, Núgvunes og Frida, leggur hann aftrat.

Tað er framvegis felagið Torvanes, sum eigur Fugltúgvuna, men eigarar av felagnum í dag eru í fyrsta lagi Jóhan Páll Joensen og Jóhan David Joensen, sum eisini eru menninir aftanfyri Norðis Seafood.

– Nú leggja nøkur smærri útróðrarfør fiskin upp á Eiði. Teir, sum eiga bátarnar Gunnvá, Gortrúgvan og Líggjas, hava verið óførir, men vit hava eisini menn av Eiði og úr øðrum bygdum, sum rógva út hiðani og avreiða á Eiði, sigur hann.

## Skipari í 32 ár

59 ára gamli Rólant Poulsen hevur sjálvur verið til skips, síðan hann var 14 ára gamal.

– Árið í ár er hitt fyrsta, har eg ongan túr havi verið.

Í tíðini á sjónum hevur hann í tilsamans 32 ár verið línuskipari.

– Eg førdi Morgunstjørnuna gjøgnum øll áttatiárini og aftur árini 1992-2004. Í sjeytiárunum var eg eisini leingi við Thomasi Nygaard, sum stýrimaður og viðhvørt sum avloysari sum skipari, sigur Rólant Poulsen.

*vilmund@sosialurin.fo*

**»» ...eg haldi ikki, at talan er um nakað serligt arbeiðsloysi í Eiðis kommunu...**
RÓLANT POULSEN

lagsskúlin á Oyrarbakka, sum Eiðis kommuna er partur av, kostaði 28 miljónir heldur enn 14 – og útbyggingin av Røktar-og Ellisheiminum í Runavík, sum kommunan eisini er partur av, kostaði 32 heldur enn 18 miljónir krónur, er greitt, at fíggjarliga myndin broytist.

– Men vit hava góðar vónir um, at fíggjarliga rásarúmið hjá Eiðis kommunu skjótt verður nakað størri, en tað er í dag, sigur borgarstjórin, Rólant Poulsen.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Fugltúgvan er einasta línuskip, sum nú er heimahoyrandi á Eiði. Áður vóru skipini fleiri í tali*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*